

*Teir hvítu vóru rætt og slætt klassar betur enn grannarnir*

Mynd: Álvur Haraldsen

sigur brotsspark. Sambært Jákupi á Borg, so bar Lukasz Cieslewicz seg undan at skjóta tað, tí tað var hann, ið var feldur. Jákup á Borg, sum var liðskipari, tók ábyrgdina á seg og smekkaði bóltin í netið til stóra gleði fyri áskoðararnar í B36 húsinum.

### »HB er eitt tekniseriu lið«

Seinasta korterið trillar B36 bóltin runt í besta Barcelona stíli, meðan áskoðararnir rópa, at HB er eitt tekniseriu lið. Tað er langt síðani, at lagið hevur verið so gott í B36 húsinum. Prikkurin yvir i'ið kom í seinasta minutti av vanligari leiktíð, tá innskifti Ingi Højsted spældi somuleiðis innskifta Kenneth Jacobsen leysan framman fyri málinum. Umvegis tvørstongina brast bólturin í vøllin og í nettakið. B36 staðfesti við málinum sigurin á grannunum og oddastøðuna í Vodafonedeildini. Í gjár riggaði alt hjá B36, sum eisini er ósigrað hetta kappingarárið. Megnar B36 at spæla eins væl í fleiri av hinum oddadystinum, so kann FM steypið eins væl enda í B36 húsinum sum nakra aðrastaðni. Komandi vikuskiftið verður oddabrak í Runavík, har nummar eitt, B36, og nummar tvey, NSÍ, bresta saman.

### Ongin broddur í HB

Sjáldan er eitt HB lið blivið so spælt av vøllinum sum í gjár. Tað er ilt at seta fingurin á akkurát, hvat tað er, sum er galið. Tað var ongin broddur í álopinum, og tað var stórur saknur í Andrew av Fløtum, sum fekk seinastu minuttirnar eftir at hava verið skaddur síðani kappingarbyrjan. Eisini Símun Samuelsen tóktist hava árin frá at vera innlagdur við allergiskari reaktión. Men har frá og til at tapa so greitt er langt. HB hevur komandi tríggjar dystirnar uppgávur, sum á papírinum eru í eru av teimum lættaru. Heimadystir móti KÍ og B68, umframt eina vitjan á Sandi. Hevur HB eina ætlan um at bjóða av í oddinum, so skulu hesir dystirnir helst vinnast.

trondur@sosialurin.fo

# Dagsins leikari – Lukasz Cieslewicz



Mynd: Álvur Haraldsen

Tað vóru fleiri góð boð upp á dagsins leikara hjá B36. Millum teirra var Lukaz Cieslewicz, sum saman við Jákupi á Borg mannaði álopið hjá B36. Uppteljingin hjá Sosialinum vísti, at Lukaz Cieslewicz hevði heili 33 rættar avleveringar í dystinum, meðan bólturin seks ferðir ikki kom fram. Eisini royndi Lukaz Cieslewicz seg við 15 driblingum og sjey ferðir eydnaðist honum at seta í minstalagi ein mótstøðumann av og avlevera bóltin. Tað gevur greið tekin um ein leikara, ið er tryggur á bóltinum og tekur stóran lut í spælinum.

Heldur undurnarvert, so hevði hann onga roynd á HB málið. Í samrøðu við 3.hálvleik helt Jákup á Borg fyri, at hetta er eisini eitt tekin um góða og flótandi spælið hjá B36 í løtuni, har tað framherjarnir flyta seg nógv og eru í størri mun partur av uppspælinum. Átta ferðir var Lukaz Cieslewicz í beinleiðis nærdysti við HB verjuna, men her tapti hann sjey av teimum nærdystinum. Tað er ikki óvanligt, at framherjar hava tað trupult tá ein langur høgur bóltur verður sendur frá verjuni og tað krevur nógv at fáa tamarhald á bóltinum. Her er tó ikki talt við, tá hann hevur fingið eina stutta sending eftir jørð við manni í rygginum. Tí samsvara tølini í nærdystinum ikki heilt við avrikið hjá B36 framherjanum, sum fleiri ferðir megnaði at sleppa sær skilagott av við bóltin hóast HB verjan var gramm á honum.

Lukaz Cieslewicz byrjaði dystin væl og var ágangandi fram til at HB kom á odda. Síðani datt hann úr dystinum til 39. minutt, tá hann við frálíkari sending átti triðj seinasta fótin á útjavnandi málinum. Í seinna hálvleiki var Lukaz Cieslewicz aftur ein stórur partur av B36 uppspælinum og við 19 røttum avleveringum og tríggjar dribblingum var hann ein av høvðusorsøkunum til, at B36 vann so sannførandi sum teir gjørdu.

trondur@sosialurin.fo

# HB liðskiparin stríddist

Fróði Benjaminsen spældi allan dystin á miðvøllinum hjá HB. Samanteljingin hjá Sosialinum vísur, at HB liðskiparin var í 25 tvídystum gjøgnum allan dystin. Av teimum vann hann 16, meðan hinir nígggju vóru taptir. Serliga í fyrra parti av fyrra hálvleiki gekk illa hjá Fróða í nærdystinum, men sum tíðin gekk mannaði hann seg upp og fór at vinna fleiri og fleiri tvídystir.

HB valdi at sparka málspørkini og útspørkini eftir høvdinum hjá Fróða og tí var hann í fleiri lufttvídystinum á miðvøllinum. Onkur av útspørkunum og málspørkunum vóru ikki heilt neyv og tí er ringt at lasta Fróða fyri taptan tvídyst tá. Eisini kann verða torført at skilja millum ein lufttvídyst og avlevering, men fleiri av vunnu lufttvídystinum endaðu við at annar HB ari fekk bótin, men tað er ikki talt við sum avlevering í hesi samantelingini.

Samanteljingin vísti, at Fróði hevði 17 rættar avleveringar í dystinum. Av teimum komu bara fimm í fyrr hálvleiki. Men tað skal havast í huga, at Fróði oftari enn so var orsøk til at bólturin fann fram til viðleikara. Í mun til Lukaz royndi Fróði seg ongantíð við eini dribbling, men hevði eina roynd á mál, sum endaði í bakinum á einum B36.



Mynd: Álvur Haraldsen

Fróði Benjaminsen gekk sum altíð á odda fyri HB, men sjálvt ikki hann megnaði at fáa HB liðið upp við høvdinum í gjár.

trondur@sosialurin.fo

## Lukasz Cieslewicz – Fróði Benjaminsen í tølum:

*1. hálvleikur - 2. hálvleikur = Samanlagt*

### Lukaz Cieslewicz:

**Avleveringar:**
Rættar 14 – 19 = 33
Skeivar 3 – 3 = 6

**Tvídystir:**
Vunnir 0 – 1 = 1
Taptir 4 – 3 = 7

**Dribblingar:**
Rættar 4 – 3 = 7
Skeivar 3 – 5 = 8

**Skot á mál:** 0 – 0 = 0

### Fróði Benjaminsen:

**Avleveringar:**
Rættar 5 – 12 = 17
Skeivar 2 – 2 = 4

**Tvídystir:**
Vunnir 9 – 7 = 16
Taptir 7 – 2 = 9

**Dribblingar:**
Rættar 0 – 0 = 0
Skeivar 0 – 0 = 0

**Skot á mál:** 0 – 1 = 1

## Lukasz Cieslewicz:

